# Bridge er ein metaforur upp á lívið

**– Øll kunna læra at spæla bridge. Tað er ikki trupult, og tú lærir nakað, tí bridge er eitt spæl, har tú hugsar, og tað goymir seg nógvur visdómur í spælinum, sigur Gianarrigo Rona, forseti í Evropeiska bridgesambandinum**

SAMRØÐA
*Heri á Rógvi*



*Forsetin í Evropeiska bridgesambandinum heldur, at Føroyar eru væl betri enn aðrar smærri tjóðir. Hann hevur bert rós at geva føroysku fyriskiparunum av NM í bridge*

*Mynd: Heri á Rógvi*

– Wait just one minut and i'll be with you.

Fryntligi og búllmikli italienarin skal líka avgreiða eina telefon-samrøðu, har hann skal fáa fatur á einum telduposti. Tað er ikki bara sum at siga tað hjá einum italienara at siga post.olivant.fo.

Hetta er fyrstu ferð, at advokaturin úr Milano er í Føroyum. Navnið er Gianarrigo Rona, og hann er forseti fyri Evropeiska Bridgesambandið.

Ørindini eru at vitja norðurlandameistarakappingina í bridge, sum í vikuni hevur verið spæld í Hotel Hafnia á Áarvegnum.

– Eg eri bjóðaður fleiri ferðir áður, men hesa ferð valdi eg at koma til kappingina. Tað er spennandi, at føroyingar eru vertir fyri hesari kappingini fyri aðru ferð, og eg má siga, at fyriskipanin er framúr góð. Alt er heilt í topp – bæði tað tekniska og tað fyrisitingarliga í sambandi við kappingina, sigur Gianarrigo Rona, sum bert hevur rós at geva føroysku fyrireikarunum og umstøðunum at spæla.

Hann vísir eisini á, at støðið í kappingini er sera høgt.

– Norðurlond teljast millum tey bestu bridge londini í heiminum. Tí er tað eisini sera flott av føroyingum at klára seg so mikið væl, sigur Gianarrigo Rona, sum fyrstu ferð sá føroyingar spæla í altjóða kapping í Italia, har føroyingur fingu fleiri góð úrslit.

Serliga eru tað føroysku menninir, sum Gianarrigo er ovfarin av. Kvinnurnar mangla enn eitt sindur, heldur hann.

– Av øllum teimum smáu londunum eru Føroyar klárt nummar eitt, sigur Gianarrigo Rona.

Evropeiska bridgesambandið umhugsar at gera ein grunn fyri at hjálpa smærri londum at menna. Ikki bert við pengum, men eisini við ráðgeving og øðrum.

### Ein millión

Tann fryntligi italienski advokaturin tekur sær góða tíð at práta, og hann vil fegin greiða frá um bridge og eggjar undirritaða at byrja at spæla.

– Tað er ikki so trupult. Eftir nakra fáar vikur, so dugir man at spæla, og tá byrjar tað rættiliga at gerast stuttligt, sigur Gianarrigo Rona.

Kring allan heim eru um ein millión skrásettir brigdespælarar. Av teimum er helvtin í Evropa. Men Gianarrigo roknar við, at nógv fleiri spæla bridge, hóast tey ikki eru skrásett. Hann fegnast serliga um framgongdina eystanfyri, har støðugt fleiri leggjast til.

– Skal bridge gerast meiri spælt, so mugu vit hava fleiri stuðlar og umtala, men tað er trupult, tí sjónvarpsstøðirnar eru ikki so áhugaðar, sigur Gianarrigo Rona.

### Djúpt

– At spæla og fylgja við í bridge er ikki sum at spæla fótbólt ella tennis. Tað tekur tíð at læra, men tað er afturfyri sera gevandi. Bridge er ein metaforur upp á lívið. Tað goymir seg nógvur vísdómur í spælinum. Tú verður heldur ongantíð liðugur at spæla, sigur Gianarrigo Rona.

Hann greiðir frá, at bridge inniheldur so nógv áhugavert, sum man kann læra av.

– Øll kunu spæla bridge.

### Ungdómurin skal við

Í Italia og Fraklandi og fleiri øðrum londum í Evropa verður stórur dentur lagdur á at fáa ungdómin at spæla bridge.

Hetta hevur givið úrslit í Italia.

– Tað er eisini tað týdningarmesta fyri føroyingar: Fáið ungdómin við!, sigur Gianarrigo Rona.

Steðgurin hjá bridgeforsetanum er stuttur á hesum sinni, men hann hevur dámað sera væl, leggur hann dent á. Hann sigur seg vóna, at føroyingar fara at menna seg enn meira í bridge.

Og so lata vit Gianarrigo Rona taka samanum, hvat hann heldur um kappingina og føroysku fyriskipanina:

– It is fantastic. A great succes.

# Teknað Føroya søga

**Markos Jiménez hevur givið út bókina Føroya krønika, sum í tekningum sigur frá fyrstu 60 millión árunum í Føroya søgu**

ÚTGÀVA
*Heri á Rógvi*



*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hálvi spaniólin og hálvi vágbingurin Markos Jiménez hevur skrivað og teknað eina øðrvísi søgubók.

Bókin er øll, sum hon er, ein teknirøð, har søgan er tann rætta føroyinga søga, sum vit kenna frá søgubókunum.

Bókin lýsir fyrstu trýss milliónir árini við serligum denti á tíðarskeiðið, tá ið menn fyrst nomu land í Føroyum.

Høvundurin skrivar í formælinum, at teknirøðin fyrst og fremst er eitt uppskot – ein persónlig, ótilgjørd tulking og kronologisk endursøgn av tí, sum – kanska – hendi í hesum steinrunna landi mitt í Atlantshavinum.

Bókin byrjar við, hvussu Føroyar vórðu til og sagt verður frá, hvussu oyggjarnar eru komnar at síggja soleiðis út, sum tær gera.

Síðani verður lopið til landnámstíðina, norrønu búsetingarnar og sagt verður eisini frá um oyggjaskeggjarnar. Tað mest spennandi við bókini eru kanska kvæðini, ið høvundurin hevur valt at gera nógv burturúr. Bæði Brestiskvæði og Sigmundskvæði yngra eru við í bókini umframt annað, ið sigur frá um føroyska søgu til fyri umleið túsund árum síðani. Niels Jákup Thomsen frá Bókadeild Føroya lærarafelags sigur, at bókin er eitt megnarverk, sum væl hugsandi kann nýtast í skúlum.

– Bókin er full av humor og speiskum viðmerkingum, og tað ger bókina spennandi, sigur Niels Jákup Thomsen.

Bókin er 62 blaðsíður við tekningum, sum allar eru í svørtum og hvítum.

Av tí at verkfall er, mugu fólk bíða til eftir verkfallið við at fara í bókabúðirnar fyri at ogna sær bókina.

### Sjálvlærdur

Markos Jiménez er 31 ára gamal og hálvur føroyingar. Hann hevur nøkur skifti búð í Føroyum, men hann hevur mest búð í Danmark og ørðum londum.

– Eg fekk hugskotið fyri fýra árum síðani. Síðani gekk tað umleið eitt ár, áðrenn eg fór ígongd. Eg veit ikki rættiliga, hví eg valdi hetta evnið, men eg fekk bara hugskotið og so fór eg ígongd, sigur Markos.

Hann sigur, at tað verður nógv arbeiði burturúr bókini. Ikki minst hevur tað tikið tíð at seta seg inn í søguna og kvæðini. Har hevur mamman, Jóna Jiménez, verið ein góður stuðul, sigur Markos.

Sjálvur er Markos ikki útbúgvin í at tekna, men hann hevur lært seg sjálvan. Íblásturin fær nógvastaðni kring heimin, og hann ætlar at kunna liva av hesum.

Ongar ætlanir eru um at vera fasbúgvandi í Føroyum, men hann dámar sera væl í Føroyum, sigur hann.

Í sambandi við útgávuna hevur Markos eisini eina framsýning í smiðjuni í Lítluvík.



# Blokadan stendur við

**Maskinmeistarafelagið noktar framvegis limum sínum at søkja størvini umborð á Tjaldrinum og Brimli**

ARBEIÐSTRÆTA
*Stefan í Skorini*



*Blokadan hjá Maskinmeistarafelagnum móti Fiskiveiðieftirlitinum stendur við. Felagið noktar framvegis limum sínum at søkja størvini, hóast nakrir maskinmeistarar ikki vilja lýða hesi boð. Trupult verður helst at manna Brimil eftir 1. juni*

– Vit nokta framvegis limum okkara at søkja størvini, sum Fiskiveiðieftirlitið lýsir eftir fólki til, sigur Jógvan Nybo, formaður í Maskinmeistarafelagnum.

Illstøðan millum Maskinmeistarafelagið og Fiskimálaráðið stendur við og versnar. Hósdagin hevði Fiskimálaráðið tíðindafund, har sligið varð fast, at teir maskinmenninir, sum søgdu seg úr starvi umborð á Tjaldrinum og Brimli, ikki verða settir beinleiðis aftur í størvini. Tey eru lýst leys, og allir kunnu framvegis søkja av nýggjum.



*Jógvan Nybo, formaður í Maskinmeistarafelagnum, er sera firtin um tað, sum stjórin í Fiskiveiðieftirlitinum førir fram í fjølmiðlunum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Hetta hevur fingið ilt í Maskinmeistarafelagið, sum heldur fast við sítt krav um, at teir gomlu fáa størvini aftur. Felagið noktar eisini limum sínum at søkja størvini aftur, og hetta kann geva Fiskiveiðieftirlitinum trupulleikar at manna bæði Tjaldrið og Brimil.

Landsstýrismaðurin við Fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, hevur nevnt møguleikan at biðja donsku sjóverjuna um hjálp at røkja fiskiveiðieftirlit og bjarging undir Føroyum.

### Lygn

Jógvan Nybo er eisini sera firtin um tað, sum stjórin í Fiskiveiðieftirlitinum, Elmar Højgaard, førir fram í fjølmiðlunum.

– Tá maðurin ikki sigur seg skilja uppsagnirnar, og at eftirlønarviðurskiftini vóru komin í rættlag, so lýgur hann, sigur Jógvan Nybo.

– Elmar Højgaard sigur, at viðurskiftini vóru komin í rættlag tann 28. februar, men sannleikin er, at vit fingu einki skrivligt frá Fíggjarmálaráðnum fyrr enn 26. apríl, tá vit fyrstu ferð fáa eina ábending um, at viðurskiftini møguliga komu í rættlag.

Trætan snýr seg um eftirlønarviðurskiftini hjá avloysarum og um regulering av nøkrum lønarflokkum, sum Karsten Hansen hevur lovað Maskinmeistarafelagnum.

# Mentamálaráðið vil hava støðugt flokkatal

**Mentamálaráðið hevði upprunaliga ætlanir um at minka flokkatalið í studentaskúlanum í Hoydølum frá komandi skúlaári, og ein 1. flokkur skuldi skiljast sundur. Hendan ætlanin er nú slept, og ein liðiligari skipan skal finnast, so at flokkatalið kann vera støðugt**

SKÚLASKAPUR
*Stefan í Skorini*



*Høgni Hoydal tók avgerðina hjá Mentamálaráðnum um at minka flokkatalið í Studentaskúlanum í Hoydølum aftur. Nú fara Yrkisfelagið og Mentamálaráðið undir samráðingar, so hesin trupulleiki ikki endurtekur seg.*

Yrkisfelagið og Mentamálaráðið hava nú avrátt at fara undir samráðingar um at fáa eina liðiligari skipan, so sleppast kann undan at skilja flokkar sundur.

Hesin trupulleiki hevur ofta verið frammi, tá Mentamálaráðið hevur givið boð um, at flokkar skulu leggjast saman, og tað hevur ofta elvt til stóra ónøgd hjá næmingum og lærarum.

Aftur í ár gav ráðið boð um, at næmingarnir í einum flokki skuldu skiljast sundur og setast í aðrar flokkar komandi skúlaár. Á henda hátt varð talið av málsligum flokkum minkað úr fimm niður í fýra.

Orsøkin til at mentamálaráðið tók hesa avgerð var, at tað skuldi spara pening, og á fíggjarlógini varð roknað við fýra flokkum ístaðinfyri fimm.

Næmingarnir mótmæltu beinanvegin og á fundi við Høgna Hoydal, sum í løtuni umsitur skúlamál í mentamálaráðnum, greiddu tey frá sínum sjónarmiðum fyri, hví hetta var ein vánalig loysn.

### Fundast um liðiligari skipan

Á fundi millum Yrkisfelagið og Mentamálaráðið varð avtalað at fara undir samráðingar fyri at finna eina loysn, so at hetta ikki kemur fyri aftur.

– Vit vilja fegin hava eina liðiligari skipan, so at vit kunnu hava eitt støðugt flokkatal. Vit hava fingið gongd á ein dialog við Yrkisfelagið, og farið verður undir samráðingar um hetta í næstum, sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður við mentamálum.

Hann sigur, at tað er sera óheppið fyri trivnaðin hjá næmingunum, at eindin í einum flokki verður brotin og vil fegin forða fyri, at hetta kemur fyri aftur. Við hesum kemur skúlaskapur og trivnaður í fremstu røð, heldur hann.

– So mugu vit bara finna pengarnar onkra aðrastaðni á fíggjarlógini hjá okkum, og tað verður neyvan nakar trupulleiki. Eg eri sera væl nøgdur við hesa loysnina, sigur hann.

### Yrkisfelagið

– Spurningurin er, hvussu vit bera okkum at, so at hetta ikki hendir aftur. Tað ber til at finna alternativar loysnir, tá flokkarnir verða settir saman, sigur Kristinbjørg Høgnesen, forkvinna í Yrkisfelagnum.

Trupulleikin er, at tað altíð er nakað av fráfalli í øllum flokkum, og so passar næmingatalið ikki meira við flokkatalið.

– Ein møguleiki er at seta flokkarnar øðrvísi saman, so at matematiskir og málsligir studentar kunnu koma í sama heimaflokk, sigur Kristinbjørg Høgnesen.

Soleiðis ber eisini til at broyta kynsbýtið í studentaskúlanum, tí dreingir hava lyndi til at velja matematisku deild og gentur málsligu deild. Annars eru tað fleiri gentur í studentaskúlanum sum heild.

Forkvinnan í Yrkisfelagnum nevnir eisini møguleikan at laga upptøkukunngerðina meira til umstøðurnar. Hetta eru viðurskifti, sum kunnu kannast nærri.

Yrkisfelagið og Mentamálaráðið hava gjørt av, at tey skulu vera liðug at samráðast áðrenn 1. september í ár. Fyrsti fundurin er enn ikki ásettur.

Tað at Yrkisfelagið vildi hyggja nærri at hesum viðurskiftum, sum skulu forða fyri, at hesin trupulleiki endurtekur seg, var við til at bjarga flokkinum, sum upprunaliga skuldi býtast sundur.